


**Nr. 3** *4. februar 2024* **84. árg.**

# Jesus, mín undurfulli Frelsari

Jesus er ikki broyttur. Hann er tann sami í dag, sum hann var, tá ið hann gekk her á jørð. Hann hjálpir menniskjum, sum eru í neyð. Sjálvt um vit eru kristin, so gerast vit eisini sjúk, fáa trupulleikar og onnur ting, líka sum øll onnur. Men vit hava ein fyrimun, vit hava EIN, sum vit kunnu koma til við øllum, sum tyngir.

Tað týdningarmesta fyri eitt menniskja er at taka ímóti Jesusi vegna tað, sum hann hevur gjørt á Golgata. Tað er neyðugt at síggja seg sum ein syndara og fáa eitt møti við Jesus, har vit kunnu játta syndir okkara og fáa fyrigeving hansara, so fáa vit tann undurfulla friðin, sum BARA hann kann geva einum menniskja. Hesin friðurin fer ikki frá okkum í trongdartíðum, tá ið vit rættiliga eru í neyð. Tá fara vit tvørturímóti at uppliva, at hann hevur umsorgan fyri okkum og tekur hond um lív okkara. Tað er tað størsta, eitt menniskja kann uppliva her á jørð.

Seinni fara vit at uppliva nógv størri ting, enn vit kunnu ímynda okkum her. Tað verður tann dagin, tá ið vit fáa at síggja Jesus, og vit fáa at síggja, at alt tað, sum vit trúðu á her, er ein veruleiki. Tað verður tann dagin, tá ið vit standa bjargað heima í Himli. Tað hevur hann nevniliga lovað okkum, og eg trúgvi øllum tí, hann hevur sagt, tí Jesus kann ikki lúgva. Hann hevur sagt, at hann er vegurin, sannleikin og lívið. Tað eri eg fullvís í, tað er mín fasta sannføring.

Hetta er vitnisburðurin hjá Veslu Bjørg Mortensen, sum hevði ta ólekjandi sjúkuna dissemineret sklerose, og sum sat 14 ár í rullistóli. Tá reisti Harrin hana upp og grøddi hana.

Hjá honum er einki ógjørligt. Vesla hevur skrivað bókina „Helbredt efter 14 år i rullestol“.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vánaligur arvur

Viðhvørt hoyrir tú fólk siga, at ein banning hvílir yvir teirra familju, ella tú kanst hoyra tey siga, at tey eru so illsint, tí tað liggur í slektini, abbin var so sera snarsintur, og hetta hava tey so arvað.

Kortanei, hatta hevði eg ikki funnið meg í, og um tú ert ein trúgvandi, skalt tú heldur ikki finna teg í slíkum pástandum. Tí Skriftin sigur: „Tí, um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!“ 2. Kor. 5,17.

Vit fáa ikki alt borðreitt á einum silvurfati. Tað eru ávís ting, sum eru okkara ábyrgd. Jesus vil, at vit skulu koma upp úr sofuni og fara til verka; men hann hevur givið okkum amboðini, sum vit skulu brúka. Jesus segði á sinni við Pætur: „Eg vil geva tær himmiríkisins lyklar, og tað, sum tú bindur á jørð, skal vera bundið í himli, og tað, sum tú loysir á jørð, skal vera loyst í himli!“ Matt. 16,19. Vit hava helst verið ov dovin og hava ikki viljað tikið ábyrgdina á okkum at loyst og bundið, av tí at vit vænta, at Gud skal gera alt fyri okkum.

Jesus segði eisini: „Og hesi tekin skulu fylgja teimum, sum trúgva: í mínum navni skulu tey reka út illar andar.“ Mark. 16,17. Um tú heldur, at tú stríðist við onkran vánaligan „arv“ frá forfedrunum, tak so Jesus upp á orðið og bið: „Í Jesu navni bindi eg hetta, og eg áleggi tí í Jesu navni at víkja frá mær og aldri koma aftur. Amen.“

*Effie Campbell.*

# At vinna síni kæru fyri Harran

*Benny Hinn*

**Sterk lyfti eru knýtt at bønini:**

„Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Hvat tit so biðja faðirin um, tað skal hann geva tykkum í navni mínum. Higartil hava tit einki biðið um í navni mínum. Biðið, og tit skulu fáa, fyri at gleði tykkara kann verða fullkomin.“ Jóh. 16,23–24.

„Og um vit vita, at hann hoyrir okkum, hvat vit so biðja um, tá vita vit, at okkum eru veittar tær bønir, sum vit hava biðið hann um.“ 1. Jóh. 5,15.

Fíggindin herjar á børn okkara og oyðileggur tey við alkoholi og narkotika. Men her eru nøkur skriftstøð, har Harrin lovar at frelsa børn okkara:

1. „Hann skal fáa hinum ørmu av fólkinum rætt; Hann skal frelsa børn hins fátæka og sláa niður kúgaran (tað, sum vil oyðileggja børn tíni).“ Sálm. 72,4. V.D. ums.
2. „Lat verk Títt opinberast tænarum Tínum og dýrd Tína yvir børnum teirra!“ Sálm. 90,16. V. D. ums.

***Her er eitt ótrúliga sterkt skriftorð, har Harrin enntá lovar at frelsa ommu- og abbabørn okkara:***

3. „Børn tænara Tína skulu búgva í friði, og avkom teirra skal verða standandi fyri ásjón Tíni.“ Sálm. 102,29. V. D. ums.

***Harrans lyfti yvir børn okkara eru ómetaliga rík og trúarstyrkjandi:***

4. „Teir, ið Harran óttast, vil hann signa, øll, bæði smá og stór. Harrin vil lata tykkum vaksa, tykkum og børn tykkara.“ Sálm. 115, 13–14.
5. „Sí, ein Harrans gáva eru synir. Sælur er maður, ið ørvahúsan fyltan hevur við teimum; teir verða ikki til skammar, tá teir í liðinum við fíggindar tingast.“ Sálm. 127,3–5.
6. „Børn tíni koma rennandi; teir, sum brutu teg niður og løgdu teg í oyði, skulu fara frá tær.“ Jes. 49,17. V. D. ums.

***Teir, sum oyðiløgdu børn tíni – um teir kallast falskar religiónir ella rúsevni – teir skulu víkja frá tær.***

7. „Eg skal tó verja teg móti atsóknarum tínum og frelsa børn tíni.“ Jes. 49,25.
8. „Tá verða øll børn tíni lærusveinar Harrans og skulu njóta miklan frið.“ Jes. 54,13.

**So kæru vinir:**

„Kastið tí ikki frá tykkum treyst tykkara, sum hevur stóra løn.“ Hebr. 10,35.

Heft hesi skriftstøðini upp á hurðina á kuldaskápinum ella á sovikamarsveggin og bið hvønn dag út frá hesum bíbliuorðum. Tá krøkir tú teg upp í Harran, og frelsan fer at koma til hús títt, tí at tá gert tú sum Nóa: „Við trúgv smíðaði Nóa ørk til bjargingar fyri húsfólk sítt.“ Hebr. 11,7, og tá verður úrslitið hetta: „Men nú sigur Harrin soleiðis: Halt rødd tíni frá gráti

og eygum tínum frá tárum; tí at tú fært løn fyri møði tína, sigur Harrin – úr fíggindalandi venda tey heim aftur (tey fara at sleppa burtur úr alkoholi og narkotika). Ja, vónrík er tín framtíð – børnini koma heim aftur í land sítt (tey koma aftur til tín og verða frelst), sigur Harrin.“ Jer. 31,16–17.

*Gospel Channel, Effie Campbell* umsetti.

# Nógv verdur

*„Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.“ Jóh.3,16.*

Góði tú, tú mást skilja, hvussu nógv tú ert verdur eftir Guds virðismáti – ikki eftir heimsins! Gud hevur tvær ferðirnar víst Jesusi, hvussu nógv tú ert verdur. Fyrst skapaði hann teg í sínari mynd, og tað merkir, at tú hevur skapandi (kreativ) evni. Síðani sendi hann son sín at frelsa teg, og tað hevði hann gjørt, um tú so vart einasta menniskja á jørð. Hetta ger teg til ein ómetaligan dýrgrip! Hesir báðir óbroytandi sannleikar áttu at verið grundarlagið undir tínum sjálvsvirði.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Hevur Jesus gripið títt unga hjarta, far so út í víngarðin og brúka arbeiðsdagin fyri tín Harra og Frelsara. Ríkir møguleikar eru so leingi, sum tað eitur í dag. Tú fært kanska eymar føtur ella knø, um tað er bønarteigurin, tú arbeiðir í. Ver vísur í tí, at tú fært løn tína í Himli.

*e.c.* ums.

---

Kennir tú Jesus, ert tú væl fyri. Neyðars menniskju, sum sjálv royna at greiða sínar trupulleikar í hesi verð! Tað er ikki løgið, at so mong mugu gevast á hendur. – Men hin trúgvandi kennir bønarinnar veg, og hann eigur vissuna um, at Gud vil grípa inn og hjálpa.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 4. febr. | **Tekstur:** | Mark. 2,1-12 | **Bíbliuorð** | Matt. 25,40b |
| 11. febr. | **Tekstur:** | Matt. 4,1-11 | **Bíbliuorð:** | Matt. 4,10b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 4** *18. februar 2024* **84. árg.**

# Eitt strálandi svar

*„... Gud skildi ljósið frá myrkrinum.“ 1. Mós. 1,4.*

Ein søga verður søgd um ein professara, sum bjóðaði sínum næmingum av: „Skapti Gud alt?“ Ein av teimum lesandi svaraði: „Ja!“ Professarin helt fram: „Um Gud hevur skapt alt, so hevur hann eisini skapt óndskapin. Og av tí at arbeiði okkara greiðir frá, hvørji ið vit eru, so er Gud altso óndur.“ Har gjørdist ógvuliga kvirt í flokkinum.

Alt í einum rætti ein annar lesandi hondina upp og spurdi: „Professarin, er myrkur til?“ Professarin svaraði: „Ja!“ Studenturin tók aftur orðið: „Nei, tygum, myrkrið er ikki til. Myrkur er bara har, av tí at ljósið er fráverandi, burturstatt. Til ber at síggja og granska ljós, men ikki myrkur. Vit kunnu brúka prismuna hjá Newton at bróta tað hvíta ljósið í mangar litir, og vit kunnu granska tær ymisku bylgjulongdirnar á teimum einstøku litunum; men tað ber ikki til at máta myrkrið. Ein einstakur ljósgeisli kann bróta ígjøgnum til eitt myrkt rúm og upplýsa tað. Hvussu kunnu vit vita, hvussu myrkt eitt rúm er? Vit verða noydd at máta tað ljósið, sum er til staðar. Myrkur er bara eitt orð, sum vit brúka, tá ið vit skulu siga, at einki ljós er til staðar.“

So spurdi tann ungi maðurin: „Tygum professarin, er óndskapur til?“ Eitt sindur ótryggur svarði professarin: „Sjálvandi.“ Hin ungi maðurin svaraði: „Nei, óndskapur er ikki til – í minsta lagi er hann ikki til í sjálvum sær. Óndskapur er rætt og slætt Guds frávera, at Gud er ikki har. Tað er júst sum við myrkrinum, eitt gjørt orð, so vit kunnu greiða

frá, at ljósið er fráverandi, tað er ikki har. Gud skapaði ikki óndskapin. Óndskapurin er eitt úrslit av tí, sum hendir, tá ið menniskju ikki hava Guds kærleika í sínum hjarta. Tað ónda er sum kuldin, ið kemur, tá ið eingin hiti er, ella sum myrkrið, ið kemur, tá ið einki ljós er."

Professarin var avvápnaður.

*„...et Ord til Dagen"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Undurfulli Gud

*Thorstein Grotbæk*

Sum ungur pastorur kom eg út á bygd í Noregi. Eg hevði eina høvuðsmeinigheit og tríggjar útpostar at røkja. Tá ið eg á fyrsta sinni skuldi fara til ein av hesum útpostum, hevði eg fyrireikað meg væl, og eg hevði harmonikuna við, so eg fekk spælt aftur við sanginum.

Tá ið eg kom til bønhúsið, vóru dyrnar opnar; men eingin var komin. Eg fór innar og setti meg at biðja. Hetta var eitt kvøld mitt í viku, og klokkan sjey skuldi møtið byrja. Tá ið klokkan var fimm minuttir í sjey, hoyrdi eg fótaskav. Eg læt eyguni upp og sá tvær gamlar konur, ið vóru yvir 80 ár. Tær vóru systrar.

Eg misti púra mótið og suffaði upp til Guds: „Harri, eg orki hetta ikki. Tú mást gera eitt undur!"

Nú var klokkan sjey, og eingin annar var komin. Eg gjørdi av at byrja møtið, tí ein eldri bróðir í Harranum hevði einaferð sagt við meg: „Vit kunnu ikki byrja møtið upp á eina lygn. Um vit hava kunngjørt, at møtið skal byrja klokkan sjey, so skulu vit eisini byrja tað tá, upp á slagið, og ikki draga tað út og bíða eftir teimum, sum eru so pjakut."

Eg bað, og eg sang, og so fór eg at tala. Tá hendi undrið. Ongantíð, hvørki fyrr ella seinni, havi eg upplivað nakað tílíkt, tí Harrin kopierar ongantíð seg sjálvan. Einki kristiligt møti er líka. Harrin læt eygu míni upp, og eg sá einglar sita í hvørjum einasta tóma sessi í salinum. Eg talaði, sum eg ongantíð hevði talað fyrr.

Eftir møtið bjóðaði eg mær at koyra hesar gomlu konurnar til hús. Eg setti fyrst ta yngru av. Tá ið hin eldra og eg vóru einsamøll, sigur hon: „Ongantíð á ævini havi eg verið til eitt møti, sum var so gott sum hetta. Og mær tørvaði tað av

sonnum! Í mong Harrans ár hevur maður mín spottað og niðurgjørt meg, av tí at eg gangi á møti. Eg var nú púra fallin í fátt av øllum hesum álopunum. Men eftir taluna í kvøld skulu hvørki maður mín ella børn míni vika meg í trúnni á Jesus, mín Frelsara.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Lívsneistin

***Hakon Bojsen, sóknarprestur í Silkeborgar kirkju.***

*„Francois førdi tað franska stýrið fyri rættin, tá ið hann royndi at noyða tað at gevast at rinda sær pengar! Tað ljóðar ørt, ha?“*

Soleiðis byrjar ein kapittul í einari sannari frásøgn í bókini „Guds Faðirhjarta“. Lat meg siga eitt sindur um innihaldið: Francois var narkomanur, brúkti LSD og morfin, var psykotiskur, hevði okkultar bindingar, var blakaður út heimanífrá, búði í einum húsbáti í Amsterdam. Eygu hansara vóru tóm, hárið var sítt og ógreitt, lívsneistin var burtur. Franski staturin hevði fyri lívstíð mett hann at vera óegnaðan at arbeiða og gav honum avlamisstyrk hvønn mánað.

Ein dagin ætlaði Francois sær at gera sjálvmorð. Hann varð førdur til „Arkina“, ein kristnan felagsskap. Eftir 10 mánaðum við bøn, føstu og nógvum hundrað tímum við ráðgeving og umsorgan var hann vorðin ein annar persónur, bæði sálarliga og likamliga. Hann sýndi kristna samkenslu og vildi liva lívið við ábyrgd. Tí hevði hann nú henda trupulleikan: Ta sosialu pensiónina! Tí hana vildi hann ikki hava longur! Tí fór hann aftur til Fraklands at siga myndugleikunum, at hann ikki longur var „óður í høvdinum“, men at hann nú var førur fyri at arbeiða fyri egnum undirhaldi.

Men myndugleikarnir høvdu ongantíð fyrr møtt nøkrum, sum bað um ikki at fáa avlamispensión, so nú vóru teir púra vísir í, at hann mátti vera „svakur“. Tí sýttu teir fyri at gevast við útgjaldingini.

Hvat gjørdi nú vinur okkara, Francois? Hann søkti sær hjálp hjá rættinum! Men løgfrøðingurin hevði heldur ikki skilt søk hansara. Men síðsta dagin undir avhoyringunum hendi „undrið“. Dómarin rópti Francois yvir til sín, og hesir spurningar og hesi svør vórðu spurd og svarað: „Tú sigur, at tú

ert ein kristin, ungi maður?“ – „Ja.“ – „Tú sigur, at Jesus hevur broytt lív títt?“ – „Ja.“ – „Og tú trýrt, at hann hevur grøtt teg fyri teir trupulleikarnar, tú hevði fyrr – og at tú kanst arbeiða nú?“ – „Ja.“ – „Trýrt tú upp á Jesus Kristus sum tín persónliga Frelsara, og at hann hevur fyrigivið tær syndir tínar?“ „Ja.“ – „Frálíkt, ungi maður. Tað geri eg eisini. Sakin er lokin.“

Hatta er frásøgnin, og hon gevur einum nógv at hugsa um, bæði ein og annan vegin. Fyri tað fyrsta, kundi tað sama hent í Føroyum, at menniskju sukku so djúpt? Ja.

Og so hin vegin. Tí frásøgnin er ein positivur vitnisburður – mitt í einum heimi, sum annars bert sigur frá negativum hendingum – at Gud hevur eitt „Faðirhjarta“, at hansara kærleiki røkkur fram til menniskjaliga talað ógjørlig viðurskifti. Og at hann brúkar menniskju í síni tænastu.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað er ongantíð eitt eitt-mansverk, tá ið ein menniskja verður kallað út á missiónsmarkina. Vit kunnu øll vera við til at halda saman hendur og biðja fyri teimum, sum eru á „Harrans vígvølli“.

*e.c.* ums.

---

Sama sinnalag var í Stefani sum í Jesusi. Stefan livdi Gudi nær og fekk kraft at biðja fyri drápsmonnum sínum eins og Jesus gjørdi. „Harri, rokna teimum ikki hesa synd uppí!“ bað Stefan.

*e.c.* ums.

---

Heimspekingurin Emanuel Kant úr Køningsberg, nú Kaliningrad, segði: „Tað eru tvær lógir, sum noyða meg at trúgva á Gud. Tað er hin magnetiska lógin í stjørnuverðini, og samvitskunnar lóg innan í mær.“

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 18. febr. | **Tekstur:** | 1 Mós. 30,22-24; 37,1-28 | **Bíbliuorð:** | Róm. 2,11 |
| 25. febr. | **Tekstur:** | 1 Mós.39,1-6+19-23; 41,1a+14-43 | **Bíbliuorð:** | Jes. 41,10c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74